Feskari tíðindi til haldararnar:

# Bløðini nú eisini um kvøldið við Skálafjørðin



Sum partur av víðkaðu og betraðu tænatuni hjá Prentmiðstøðini verða bløðini, Sosialurin og Dimmalætting nú eisini borin út til búplássini við Skálafjørðing á kvøldi. Fyrstu ferð mánakvøldið 29. november. Hetta merkir, at haldararnir av bløðunum fáa eina nógv skjótari tænastu og sleppa undan at skula bíða eftir bløðunum til út á fyrrapartin dagin eftir, at tey eru prentað. Nú verða bløðini borin til allar haldararnar við Skálafjørðin sama kvøld sum bløðini eru prentað.

Frammanundan hevur Prentmiðstøðin tikið stig til at bera bløðini út um kvøldarnar til fleiri býir og bygdir uttan fyri miðstaðarøkið. Eitt nú til Klaksvíkar, Fuglafjørð, Lorvík og Gøturnar.





Bókin setir samtíðina undir luppin og reisir nógvar viðkomandi spurningar. Kann rasisma taka seg upp í Føroyum? Hanga áttatiárini sum ein moralsk marra yvir okkum? Er føroysk mentan steðgað upp í fortíðini? Er ov høgt blóðtrýst prísurin fyri høgt livistøði? Sleppa vit undan fullum limaskapi í ES? Kappast fjølmiðlarnir um undirhald og ikki innihald?

